UTTAN ÚR HEIMI

# Stríð um næsta pávan



*Týski kardinalurin Joseph Ratzinger, sum stóð fyri messuni, tá Jóhannes Páll pávi fór til gravar, verður mettur at hava góðar møguleikar at taka við*
*Mynd: Reuters*

**Pávavalið byrjar ikki fyrr enn tann 18. apríl, men stríðið um, hvør skal taka við eftir Jóhannes Páll, er langt síðani byrjað**

PÁVAVAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Meiri enn 200 ríkis- og stjórnarleiðarar og umboð fyri aðrar trúarbólkar vóru í gjár í Rom og fylgdu Jóhannesi Páll páva Øðrum til gravar.

Men longu áðrenn jarðarferðina vóru teir 116 kardinalarnir farnir um umrøða, hvør skal taka við eftir tann væl umtókta pávan. Reglurnar fyri pávavaláseta, at tað er bannað kardinalunum at reka valstríð ella at gera samgongur til frama fyri eit ávíst valevni. Men júst valið hesaferð verður hildið at hava sera stóran týdning fyri, hvørja kós tann katólska kirkjan skal halda í komandi árum, og stríðið um kósina er langt síðani byrjað, søgdu vælvitandi keldur í Rom í gjár sambært Reuters.

Týska tíðarritið Der Spiegel skrivaði í gjár, at ein meiriluti av kardinalunum vilja ikki hava ein páva, sum dámar at vísa seg í fjølmiðlunum, og sum ferðast kring heimin og umboðar kirkjuna úteftir. Teir vilja heldur hava ein, sum skal virka sum hirðanna hirði, og sum er til reiðar at lurta eftir trupulleikunum hjá prestunum og at hjálpa teimum í arbeiðinum. Hinvegin er ógreitt, um teir vilja hava ein páva, sum skal halda ta somu afturhaldssinnaðu kósina sum Jóhannes Páll, ella um teir heldur vilja hava ein, ið kann góðtaka ávísar nýskpanir.

Sambært Der Spiegel eru tað serliga tveir kardinalar, sum hava bestu møguleikarnar, og sum umboða hvør sína kós. Annar er týskarin Joseph Ratzinger, sum hoyrir til tann afturhaldssinnaða bólkin, og hin er italiumaðurin Carlo Maria Martini, ið er ein av teimum nýskipanarhugaðu kardinalunum. Báðir eru 78 ára gamlir.

Tann 18. apríl skulu kardinalarnir til messu, og síðani fara teir í Sixtinska kapellið at velja næsta pávan. Upprunaliga skuldu teir vera 117 í tali, men teir vera bara 116, tí Jaima Sin, kardinalur í Manila, er ov sjúkur til at fara til Rom.

# Svenski kvinnuflokkurin kann broyta javnvágina

**Kanningar benda á, at tann nýstovnaði kvinnuflokkurin kann gera, at teir borgarligu fáa valdið í Svøríki**

SVØRÍKI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Líkt er til, at Gøran Person, forsætisráðharri, hevði rætt, tá hann herfyri ávaraði um, at ein nýggjur kvinnuflokkur fer einans at hava við sær, at teir borgarligu fáa valdið aftur í Svøríki.

Mánadagin bleiv kvinnuflokkurin formliga stovnaður, og í gjár vísti ein kanning hjá blaðnum Dagens Nyheter, at flokkurin hevði fingið sjey prosent av atkvøðunum og ímillum 24 og 27 av teimum 349 tinglimunum, hevði ríkisdagsval verið nú. Men tað áhugaverda við kanningini er, at næstan allir veljararnir hjá flokkinum høvdu komið frá flokkunum á vinstravonginum. Vinstraflokkurin hevði mist meiri enn 25 prosent av sínum veljarum, Umhvørvisflokkurin hevði mist 17 prosent av sínum, meðan missurin hjá Sosialdemokratunum hevði verið minni.

Verður hetta úrslitið á næsta vali, fer tað at hava við sær, at bæði Vinstraflokkurin og Umhvørvisflokkurin fara niður um minstamarkið fyri at fáa umboð í Ríkisdegnum, og uttan teirra stuðul missa Sosialdemokratarnir stjórnarvaldið til teir borgarligu.

Júst sum Gøran Persson ávaraði um.


Havnar Bio

kall Coca-Cola




The Aviator — FRUMSÝNING

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 08.04 | kl. 20.00 |
| Leygardag | 09.04 | kl. 20.00 |
| Sunnudag | 10.04 | kl. 19.15 |




Agent Catwalk 2

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 08.04 | kl. 20.30 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 09.04 | kl. 20.30 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 10.04 | kl. 19.45 | kl. 22.45 |




The Ring 2

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 08.04 | kl. 23.00 |
| Leygardag | 09.04 | kl. 23.00 |
| Sunnudag | 10.04 | kl. 22.15 |




Robotter

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 08.04 | kl. 18.00 |
| Leygardag | 09.04 | kl. 18.00 |
| Sunnudag | 10.04 | kl. 17.15 |

Komandi filmur




Hide and Seek — FRUMSÝNING

Fríggjadag 15.04

www.bio.fo • Telefon 31 19 56

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu